


# Framtaksgrunnurin letur rakstrarlán til Smyril Line

**Framtaksgrunnurin fer at lata Smyril Line lán til raksturin. Tað váttar nevndarformaðurin í Framtaksgrunninum, Dagmar Joensen. Hon vil ikki nevna nakra upphædd**

SMYRIL LINE
*Edvard Joensen*



*Dagmar Joensen, nevndarformaður í Framtaksgrunninum, váttar fyri Sosialinum, at Framtaksgrunnurin fer at lata Smyril Line pening til raksturin*

Framtaksgrunnurin fer eins og hetlendski oljugrunn-urin at lata Smyril Line rakstrarlán. Tað váttar Dagmar Joensen, nevndarformaður í Framtaksgrunninum.

Dagmar Joensen vil tó ikki siga nakað nágreiniligt krónutal, sum Framtaksgrunnurin fer at lata Smyril Line. Bert tað, at tað verður í mun til ognarpartin í felagnum. Framtaksgrunnurin eigur 16,9 prosent av partapeninginum í Smyril Line, sigur nevndarformaðurin í grunninum.

Leiðslan í Framtaksgrunninum hevur ikki enn tikið støðu til, hvussu verður við framhaldandi at seta partapening í Smyril Line.

Ikki annað enn, at um peningur í framtíðini verður settur í felagið, verður tað sum partapeningur, sigur Dagmar Joensen. Tað, at grunnurin nú fer at lata flagnum rakstrarlán, er eitt eingangsfyribrigdi, skilst á henni. Tað verður gjørt fyri at hjálpa upp á fíggjarstøðuna hjá Smyril Line her og nú.

Tað hevur verið nevnt, at Framtaksgrunnurin, eins og hinir stóru partaeigararnir í Smyril Line, hevur givið prisipiella tilsøgn um at seta meira partapening í felagið.

Men enn veit eingin, heldur ikki leiðslan í Framtaksgrunninum, um tað yvirhøvur verður til nakað við tí.

Sum skilst á nevndarmanninum í Framtaksgrunninum, er avgerðin ikki meira bindandi enn so, at um leiðslan í Smyril Line ikki kemur við eini ætlan, sum nevndin í Framtaksgrunninum heldur vera nóg skilagóða, so verða ikki fleiri pengar settir í Smyril Line.

– Støðan er tann, at hatta verður viðgjørt sum eitthvørt annað mál, og kemur leiðslan í Smyril Line við eini ætlan, sum vit halda vera skilagóða, fara vit at taka støðu eftir, tí, sigur Dagmar Joensen, nevndarformaður í Framtaksgrunninum.

Tó sigur hon, at tað, at ein prinsipiell tilsøgn um at hækka partapenignin er givin, skal takast sum ein ábending um, at Framtaksgrunnurin er sinnaður at vera við til at halda Smyril Line flótandi, sigur hon.

Dagmar Joensen vil ikki gera viðmerkingar til tað, sum Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, her fyri segði við Útvarpið um, at Framtaksgrunnurin í fyrsta umfari eigur at sleppa undan at hugsa um gjald sítt til landskassan. Landsstýrismaðurin metti Smyril Line hava so stóran samfelagsligan týdning, at Framtaksgrunnurin skuldi brúka alla sína arbeiðsorku upp á tað málið.

– Vit viðgera ikki politisk mál, er einasta viðmerkingin frá nevndarformanninum í Framtaksgrunninum.

Tað eydnaðist ikki, áðrenn blaðið fór til prentingar, at frætta frá leiðsluni í Tryggingarfelagnum Føroyum, um eisini Tryggingarfelagið fer at lata rakstrarlán til Smyril Line.

# Góð íløga hjá hetlendingum

**Hetlendingar fegnast um, at Shetland Development Trust setti pening í Smyril Line. Hesin peningur sæst væl aftur í Hetlandi, siga teir**

ÍLØGA
*Edvard Joensen*



*Hetlendski ferðavinnustjórin, Andy Steven, fegnast um øll tey fremmandu ferðafólkini, sum Norröna flutti til Hetlands í fjør*

Mynd: Edvard Joensen

Hetlendingar eru sannførdir um, at tað var rætt av teimum at seta pening í Smyril Line. Hetta sæst nú aftur í hetlendskum vinnulívi, skrivar The Shetland News.

Knappar seks milliónir pund, ella einar 65 - 70 milliónir danskar krónur, metir blaðið, at hetlendski búskapurin fekk burtur úr Norrönu bara í fjør. Og tað er ikki so galið fyri ein íløgu up á 4,2 milliónir pund, sum Shetland Development Trust, SDT, setti í Smyril Line fyri trimum árum síðan, sigur blaðið. Blaðið sigur, at Norröna hevur tryggjað 56 arbeiðspláss í Hetlandi.

Sum vera man er tað serliga í ferðavinnuni, tey leggja merki til Norrönu, sum í fjør flutti 7.500 vitjandi til Hetlands.

Stjórin í Hetlendska ferðaráðnum, Andy Steven, fegnast um framgongdina, og vísir á, at tað er serliga báðum megin sjálva summarsiglingina, at tey merkja vøksturin best. Og hesum ferðafólkunum, sum koma á vári og heysti, heilsa hetlendingar serliga vælkomnum, sigur hann.

The Shetland Times væntar hetlendingum nógv burtur úr ætlaða samstarvinum millum Smyril Line og Fjord Line, sum blaðið sigur fara at verða veruleika um einar fjúrtan dagar, ikki minst takkað teirri innspræningini upp á tríggjar milliónir pund, sum Smyril Line herfyri fekk úr Hetlandi.